# Asfalt í myndum



*Tá ið Margreta á Rógvu slapp framat í ljóðmyndini hjá Brama, varð øllum greitt, at hon hevði eina ótrúliga góða rødd, sum hon dugir væl at brúka. Hon var eisini til staðar á pallinum á ein feitan hátt*

*mynd: Ólavur Frederiksen*



*Til tíðir vóru Bendar Spónir sum eitt bland millum Doors og Pink Floyd. Mest droymandi o vælljóðandi, men so kom eisini swing og ferð á viðhvørt*

*mynd: Jens K*



*Tað krevur sín mann at spæla tungt, og hetta megna Ineptus. Tað ljóðaði væl og varð væl spælt. Ongin slingur í valsinum, fyri nú at nýta eitt orðatak, ið ikki hóskar til tónleikaslagið.*

*mynd: Jens Kr. Vang*



*Alt gekk væl hjá Side Effect, inntil knappliga, í øðrum ella triðja sangi, tekniska útgerðin hjá Brynjolfi sløknaði. Brynjolfur hevur bulin av tónleikinum hjá Side Effect um hendi. Bólkurin nyttar snøgt sagt einki uttan hann*

*mynd: Jens Kr. Vang*



*Ein feril av sigoynaratónleiki, fólkatónleiki, skemti og søgusigandi teksti. Hetta lýsir kanska nakað av tí, ið nýggi og spennandi bólkurin Dánjal stendur fyri*

*mynd: Jens Kr. Vang*




*Óivað snøggasti sangarin at trína á pall á ársins Asfaltsfestivali, var Petur Háberg. Og hann var ikki einans penur og pent ílatin – hann var stuttligur og charmerandi*

*mynd: Ólavur Frederiksen*

